Løgmansskrivstovan

Dagfesting: Skrivið her
Mál nr.: 25/03101
Málsviðgjørt: DK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	Í lov nr. 28 af 29. januar 1964 om en investeringsfond for Færøerne m.v., som ændret ved lov nr. 217 af 27. maj 1970, lov nr. 153 af 31. marts 1976, § 1 i lov nr. 566 af 16. november 1977, lov nr. 350 af 18. april 2007, lov nr. 512 af 27. maj 2013 og lov nr. 1461 af 10. december 2024, verða gjørdar hesar broytingar:
	§ 1 b. Grunnurin er sjálvstøðugur almennur grunnur. Landsstýrisfolkið hevur eftirlit við grunninum og velur grannskoðara á ársfundi grunsins. *Stk. 2.* Inntøkur og útreiðslur grunsins verða ikki tiknar við í løgtingsfíggjarlógina. *Stk. 3.* Grunnurin ger á hvørjum ári eina ársfrásøgn í samsvari við ársroknskaparlógina við neyðugum tillagingum. Grannskoðað ársfrásøgn, góðkend av stýrinum í grunninum, skal saman við viðmerkingum grannskoðarans verða latin landsstýrisfólkinum í seinasta lagi 4 mánaðir eftir roknskaparenda.

	Stk. 4. Grunnurin hevur sjálvstøðugan roknskap og fíggjarstøðu sum eksternur grunnur í landsroknskapinum. *Stk. 5.* Grunninum er heimilað at rinda landskassanum part av ársúrslitinum eftir skatt.
	§ 4 b. Grunnurin fær heimild til at veita P/F Vága Floghavn lán uppá í mesta lagi 350 mió. kr. Lánið kann vera rentufrítt og fellur til gjaldingar upp til 10 ár eftir, at lánið er latið
	§ 4 c. Grunnurin fær heimild til at veita P/F Suðuroyartunlinum lán uppá í mesta lagi 350 mió. kr. Lánið kann vera rentufrítt og fellur til gjaldingar upp til 30 ár eftir, at lánið er latið.
	§ 4 d. Inntøka sum verður staðfest av rentufríum lánum, sbr. § 4 b og § 4 c, hjá nevndu partafeløgunum, telist ikki við í teirra skattskyldugu inntøku.”
	§ 2 *Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd. *Stk. 2.* § 1, nr. 1 fær virknað frá 1. januar 2025.